## DAGSINS MEINING

# Ein góð søk

Eldraráðið er nú valt og farið til verka. Hetta er í roynd og veru ein stór og týðandi hending. Sum flestøll munnu vita, so gerast vit í øllum Norðurlondum alt fleiri eldri samstundis, sum tað gerast alt færri at uppihalda hesum mongu eldru. Samanborið við grannalond okkara er støðan hóast alt nakað betri her í Føroyum, tí føroyingar fáa í meðal fleiri børn enn grannar okkara. Sostatt verður fólkapyramidan ikki so skeiv her sum t.d. í Danmark. Men sum sagt, er hetta eitt álvarsmál eisini í Føroyum. Tað er tí púra beint at seta fokus á viðurskiftini hjá teimum eldru í Føroyum. Leingi hevur í høvuðsstaðnum verið talað um eitt eldraráð. Nú fingu vit so ein virkisfýsnan býráðsformann og eitt býráð, sum tykist megna at gera orð til gerðir og skjótt varð eldraráðið sett í verk.

Lat tað tí verða sagt alt fyri eitt, at avgerðin um at skipa eitt eldraráð í høvuðstaðnum er eitt frálíkt hugskot. Sum longu nevnt, gerast alt fleiri eldri borgarar. Viðurskifti teirra eru sera ymisk eins og tey eldru sjálv eru sera ymisk soleiðis sum øll menniskju eru tað. Tað ber tí ikki til at skera øll eldri yvir ein kamb og er tað júst hetta, ið ger, at tað ikki er so heilt einfalt at skapa áhugaverd, góð og mennandi tilboð til teir medborgarar okkara, sum vegna aldur eru farin av arbeiðsmarknaðinum. Hvør er bestur til at finna tey røttu tilboðini? Hvørjir eru serfrøðingarnir á økinum? Tað eru júst tey eldru. Tað eru tey eldru, sum best vita, hvat teimum tørvar á ymsum tænastuøkjum. Tað er tí í tøkum tíma, at eldraráð verður skipað og avgerðin tænir býráðnum til heiðurs.

Tað er samfelagsins skylda at tryggja okkum øllum góð og innihaldsrík ellisár. So leingivit orka og megna, eiga vit at varðveita høvi og møguleikar at taka lut í samfelagslívinum. Tey eldru skulu ikki metast sum ein samfelagstrupulleiki, men sum ein møguleiki og ein styrki fyri samfelagið og harvið fyri okkum øll. Tey eldru hava lívsroyndir, tey hava stóra vitan og tey hava tíð at deila teirra vitan við okkum, sum enn eru á arbeiðsmarknaðinum. Hetta eru alt virði, ið hava stóran týdning fyri eitt samfelag. Tað ræður um at leggja eldrapolitikkin soleiðis til rættis, at allir partar fáa gagn av honum. Tey eldru so tey njóta góð tilboð og ta virðing, ið tey hava uppiborið og samfelagið skal kunna njóta gott av allari teirri vitan og teimum lívsroyndum, sum tey eldru goyma í minninum. Í flestøllum mentanum verða tey eldru hátt mett. Soleiðis hevur tað eisini verið hjá okkum og soleiðis eigur tað framvegis at vera her í Føroyum. Nývalda eldraráðið hevur saman við Tórshavnar býráð eina stóra ábyrgd her. Vit ivast ikki í, at nývalda eldraráðið fer at megna at liva upp til hesa stóru ábyrgd. Men eisini vit øll onnur, sum enn ikki eru komin upp í tann samfelagsbólkin, ið vit nevna tey eldru, hava eina stóra ábyrgd at tryggja ein góðan virðiligan og mannsømiligan eldrapolitikk. Til ein slíkan politikk hoyrir eisini spurningurin um eina haldgóða pensiónskipan fyri øll, eitt mál, ið ikki tolir at bíða longur. Ein slíkur politikkur kemur í longdini at gagna øllum – ungum sum eldri, ja, samfelagnum øllum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Bygdaleiðir og Farmaleiðir

**Palli Dalsgaard**



Hesar báðar flutningsleiðir eru størsta bygdamenning, ið nakrantíð eru framdar í seinni tíð. Og báðar hava givið úrslit, og ikki eiti á úrsliti til tað betra har tær hava verið.

Hvør, ið kom við hvørjari, minnist eg ikki, tað kann vera líka mikið. Men Thomas Arabo var stjóri á Strandferðsluni um tað mundið, og hansara partur lá ikki eftir, tá um Farmaleiðir var at tala. Og broytingin var ikki eiti á stór til tað betra. Atli Jensen gjørdi eitt stórt arbeiði fyri at fáa Bygdaleiðir upp at standa. Báðar leiðirnar komu í tøkum tíma, at tær ikki bóru seg, var hvørjum manni púra greitt, fyri tí máttu tær blíva veruleiki, sum tær eisini blivu. Havi fyrr í bløðunum roynt at forsvara Bygdaleiðir, tá ágangurin hevur verið ov nógvur um hesa farleið. Sjálvur var eg við til at dríva eina slíka rutu í mínum bestu árum, so eg havi eina føling av hvussu ómøguligt tað er at fáa tað at hanga saman fíggjarliga.

Tað er tyngri ídag, nú útreiðslunar eru fleirfaldaðar, og inntøkurnar í minking. Men eisini veit eg hvussu nógv hesar rutur eru verdar fyri tey, ið enn royna at búleikast á teim smáu plássunum. Tí er tað harmiligt at síggja og hoyra í pressuni, at Farmaleiðir skulu takast av við lóg, tí tær ikki bera seg.

Hettar hevði verið tað seinasta, ið nakar av okkum sum búleikast her, høvdu vænta. Tí tosið um útjaðaran hevur verið tað mótsatta, men eingin hevur vita hvussu plássini skulu lúggast.

Míni ráð skulu vera til teir, ella tey, sum koma við slíkum tilmæli, at kappa høvdið av øllum tí, sum heldur lív í okkara samfelag. Farið sjálvi út á bygdirnar og setið tykkum væl inn í hetta arbeiði, áðrenn tit koma við tilmæli um at avtaka hesar leiðir. Tí sum sagt, at fáa tær at bera seg fíggjarliga letur seg als ikki gera.

# Lógarsmíð ella krotusmíð

**Vinnunvendin kallaði ikki sakkunnleikan inn í viðgerðini av einum uppskoti til samtyktar um broytingar í hámarksferðini fyri prutl.**

**Skilaleyst – serstakliga tá hugsað verður um, at bara í hesum árinum hava ferðsulvanlukkur á prutli kravt trý ung mannalív**

**Rúna Sivertsen**
*Formaður*
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*



Tað var bert at tilvild, at Ráðið fyri Ferðslutrygd frætti um hetta uppskotið, sum kemur til 2. viðgerð á Føroya Løgtingi týsdagin.

Málið snýr seg um at flyta hámarksferðina hjá prutlum frá 30 km/t til 45 km/t.

Umframt leggur uppskotið upp til, at prutlini ikki verða tøknuliga avmarkað til at koyra 45 km/t, men bara at lógarkrav verður sett um hámarksferð, sum hjá akførum. Ferðslutrygd hevur mælt til at seta hámarksferðina hjá prutlum upp, treytað av, at undirvísing verður sett í verk samstundis. At prutlini ikki skulu verða avmarkað at koyra 45 km/t tekur Ráðið fyri Ferðslutrygd ikki undir við.

Hvørki Politiið, Akstovan Ráðið fyri Ferðslutrygd ella Koyrilærarafelagið eru hoyrd í hesum máli, ella eru biðin um at koma við viðmerkingum til uppskotið.

Í Føroyum doyggja lutfalsliga fleiri í ferðsluni enn í okkara grannalondum – hetta hava vit gjørt vart við og endurtikið í tað óendaliga.

Men tað er sum at sletta vatn á gás!

Framvegis taka tey ráðandi ikki ferðslutrygdina í álvara, men lata eitt slíkt mál av hondum, uttan at tryggja sær neyðugu vitanina.

Vegna Ráðið fyri Ferðslutrygd heiti eg staðiliga á Føroya Løgting at beina málið aftur í nevnd, so sakkunnleikin kann takast við upp á ráð, áðrenn uppskotið verður samtykt.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.